# Nýggir almennir stovnar skulu leggjast uttan fyri Havnina

**Bjarni Djurholm, tingmaður fyri Fólkaflokkin, fekk í gjár svar upp á fyrispurningin, hann setti Akseli V. Johannesen, landsstýrismanni, um Heilsutrygd**



*Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður*



*Bjarn Djurholm, løgtingsmaður*

HEILSUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm vildi hava at vita, hvør var sakliga grundgevingin fyri at staðseta heilsutrygdarstovnin í Klaksvík. Síðani spurdi hann, hvørji høli eru tøk til nýggja stovnin í Klaksvík, og hvat fer tað at kosta limunum at byggja upp nýggju umsitingina í Klaksvík.

Í triðja lagið spurdi hann, í hvørjum plássum í landinum sjúkrakassarnir í dag eiga egnað høli til umsiting av nýggju heilsutrygdarskipanini og hví samráðingarnar við sjúkrakassarnar um eginognina longu eru slitnaðar, og hvat meinar landsstýrismaðurin við, tá hann sigur seg ikki vilja arbeiða undir trýsti.

Hann vildi eisini hava landsstýrismannin at greiða frá, hvør vissa er fyri, at eginognin hjá sjúkrakøssunum kemur limunum til góða, og at tær uml. 45 mió. kr ikki bara enda í einum ódefineriligari nýtslu.

Svarið frá landsstýrismanninum er soljóðandi:

**»Til 1: Hvør er sakliga grundgevingin fyri at staðseta heilsutrygdarstovnin í Klaksvík?**

Tann 1. januar 2010 kom nýggj lóg um almenna heilsutrygd í gildi. Samstundis fór skipanin við 11 sjúkrakassum kring landið úr gildi. Framyvir verður umsitingin í staðin savnað í nýggja almenna stovninum Heilsutrygd.

Talan er tí ikki um at flyta eina almennan stovn. Talan er um at staðseta ein nýggjan almennan stovn. Í samgonguskjalinum stendur, at nýggir almennir stovnar skulu leggjast úti um landið sum liður í økismenningarpolitikkinum hjá samgonguni. Landsstýrismaðurin hevur fylgt samgonguskjalinum, tá avgerð skuldi takast um staðsetingina av Heilsutrygd, og lagt stovnin uttan fyri Høvuðsstaðin. Málið hevur verið fyri á landsstýrisfundi, har undirtøka eisini hevur verið fyri ætlanini hjá landsstýrismanninum at leggja Heilsutrygd í Klaksvík.

Heilsutrygd er ein stovnur, sum í útgangsstøðinum kann leggja næstan allastaðni. Tó verður mett, at hann liggur betur á meginøkinum. Serliga hevur hetta týdning fyrstu tíðina, soleiðis at skiftið frá sjúkrakasssunum til Heilsutrygd kann fara fram á ein smidligan hátt.

Við at leggja umsitingina á meginøkinum verða ikki óhepnir trupulleikar við at útvega starvsfólk við røttu førleikum. Heilsutrygd hevur brúk fyri bæði starvsfólkum við neyðugum royndum frá sjúkrakassaarbeiði, men somuleiðis verður neyðugt við fleiri starvsfólkum við hægri útbúgving, ið skulu virka fyri at nútíðargera Heilsutrygd, eitt nú við at gera gamlar tilgongdir meira einfaldar.

Aftrat hesum kemur Heilsutrygd – serliga í uppbyggingini – at hava tætt samstarv við eitt nú Apoteksverkið, kommunulæknar, sjúkrahús, Almannastovuna og Heilsumálaráðið. Tí verður mett, at stovnurin liggur betri á meginøkinum, so koyrandi er ímillum partarnar.

Heilsutrygd skal talgildast í 2010. Í ár er ætlanin somuleiðis at koma á mál við verksetingini av Talgildu heilsuskipanini (THS) á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Við at leggja Heilsutrygd í Klaksvík, kemur Heilsutrygd at liggja upp at eini av teimum stóru uppsetingunum av THS, og kann Heilsutrygd gerast ein partur av einum KT-menningarumhvørvi, ið er sera týdningarmikið, fyri at fáa ein effektivan stovn.

Tá samgonguskjalið sigur, at miðast skal eftir, at nýggir stovnar skulu leggjast úti um landið, verður mett, at Heilsutrygd liggur best í Klaksvík.

Út yvir tær fakligu grundgevingarnar fyri valinum av at staðseta Heilsutrygd í Klaksvík, so er eisini talan um at velja eitt øki í landinum, sum er eina harðast rakt av fíggjarligu kreppuni, sum herjar í løtuni. Arbeiðsloysitalið er hægst í Norðurøkinum. Norðurøkið hevur verið tað økið í landinum, sum hevur verið mest tengt at fiskivinnuni. Talið av størvum í fiskivinnuni á sjógvi er minkað nógv seinastu árini, og er tað onki sum bendir á, at fleiri størv fara at verða í fiskivinnuni á sjógvi í nærmastu framtíð, heldur tvørturímóti. Hetta hevur eisini verið við í metingini, hóast hetta ikki er høvuðsorsøkin til valið av staðseting.

**Til 2: Hvørji høli eru tøk til nýggja stovnin í Klaksvík, og hvat fer tað at kosta limunum at byggja upp nýggju umsitingina í Klaksvík?**

Í næstum fer Heilsutrygd at søkja eftir hølum til umsitingina. Hølini skulu hava hóskandi stødd og dentur fer at verða lagdur á, at atkomuviðurskiftini eru í lagi. Longu nú hava fleiri vent sær til Heilsumálaráðið við áhugað at útleiga høli. Í einari skiftisskipan kemur Heilsutrygd at fáa innivist í hølunum hjá Norðoya sjúkrakassa, sum heldur til í Føroya Banka.

Mett er, at kostnaðurin av at byggja Heilsutrygd upp er 500 tús.kr. Tá eru útreiðslur til nýggjar telduskipanir v.m. ikki taldar við. Mett er, at leiguútreiðslurnar av hølum í Klaksvík eru nakað lægri, enn tær høvdu verið í Tórshavn.

**Til 3: Í hvørjum plássum í landinum eiga sjúkrakassarnir í dag egnaði høli til umsiting av nýggju heilsutrygdarskipanini?**

Fuglafjarðar- og Havnar sjúkrakassi eiga bygningin, har tey húsast. Í hesum sambandi skal leggjast afturat, at sum spyrjaranum kunnugt, so er enn eingin endalig loysn á spurninginum viðvíkjandi fænum, so Heilsutrygd kann sjálvsagt ikki yvirtaka hølini í Fuglafirði ella í Havn, meðan støðan er sum hon er.

**Til 4: Hví eru samráðingarnar við sjúkrakassarnar um eginognina longu slitnaðar, og hvat meinar landsstýrismaðurin við, tá hann sigur seg ikki vilja arbeiða undir trýsti?**

Spurningurin um fæið hevur havt allarstørstu rúmd í samskiftinum, sum hevur verið millum Heilsumálaráðið og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, meðan lógaruppskotið um Heilsutrygd er blivið fyrireikað.

Eitt annað mál, sum Heilsumálaráðið hevur lagt dent á, er at fáa eitt smidligt skifti frá gomlu sjúkrakassaskipanini til nýggju almennu heilsutrygdina. Í hesum sambandi var Meginfelag Sjúkrakassa Føroya positivt sinnað í spurninginum um, at sjúkrakassarnir hildu áfram við umsitingini í fyrsta ársfjórðingi 2010, sum Heilsumálaráðið ynskti.

Samráðingarnar um fæið byrjaðu í oktober mánaði, og á fundi sum var hálvan desember varð avtalað, at sjúkrakassarnir skuldi lata Heilsumálaráðnum nakað av tilfari, og at næsti samráðingafundur skuldi verða eftir ársskiftið. Arbeitt var samtíðis við at fáa avtaluna um skiftisskipanina endaliga upp á pláss, har sjúkrakassarnir umsótu Heilsutrygd ta fyrstu tíðina.

Í jólavikuni boðaði Meginfelag Sjúkrakassa Føroya frá, at sjúkrakassarnir settu sum treyt fyri, at teir vildu umsita Heilsutrygd í eini skiftistíð, at teir fingu helvtina av fænum, tvs. umleið 20-25 mió. kr. Sjúkrakassarnir boðaðu samstundis frá, at eingin orsøk var at halda áfram við samráðingunum, um teirra krav ikki varð eftirlíkað.

Hetta kundi landsstýrismaðurin als ikki góðtaka, og hann tók útsagnirnar frá sjúkrakassunum til eftirtektar, um at samráðingarnar um fæið skuldu steðga. Ein onnur loysn fyri skiftistíðina er síðani sett í verk í tøttum samstarvi við Norðoya Sjúkrakassa.

Tað seinasta sum er hent í málinum er, at Meginfelagið skrivliga hevur boðað frá, at teir ynskja, at samráðingarnar halda fram. Sambært lógini so skal landsstýrismaðurin leggja eitt lógaruppskot fyri Løgtingið um fæið í hesari tingsetuni. Best hevði verið, um talan var um eina loysn, sum var úrslit av eini samráðingarsemju.

**Til 5: Hvør vissa er fyri, at eginognin hjá sjúkrakøssunum kemur limunum til góða, og at tær uml. 45 mió. kr ikki bara enda í einum ódefineriligari nýtslu?**

Ætlanin hjá landsstýrismanninum hevur alla tíð verið, at fæið hjá limunum í sjúkrakassunum skulu koma limunum til góðar, t.v.s. øllum føroyingum. Tí er ætlanin hjá landsstýrismanninum, um fæið fylgja við limunum yvir í Heilsutrygd, at fæið í størstan mun fer í ein Heilsugrunn, heldur enn í landskassan. Avkastið av fænum kann verða nýtt til at stuðla ymsum endamálum, sum eru til gagns fyri økið, sum sjúkrakassarnir hava virkað innan fyri, herundir gransking og menning av heilsuverkinum o.l. Á hendan hátt koma allir føroyingar at fáa gagn av fænum, sum øll hava verið við til at bygt upp.

Somuleiðis hevði ein Heilsugrunnur við slíkum endamáli eftir mínum tykki verið ein virðiligur varði um góða arbeiðið, ið sjúkrakassarnir hava veitt føroyingum í yvir eina øld.«

